# Vegleiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum

Brunatrygd

# Vegleiðing um at seta upp oljutangar

September 2018

**Hvar er ein vegleiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum?**

Endamálið við vegleiðingum frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum er vegleiða hvussu ásetingar í lóggávu skulu skiljast/tulkast. Vegleiðingar verða brúktar til at:

- greina út orð og setningar í reglunum
- greiða frá, hvussu krøvini í reglunum kunnu lúkast í royndum
- greiða frá vitan um at tulka reglu í sambandi við dómar
- greiða frá, hvussu viðkomandi lóggáva er samansett, og hvørji øki hon umfatar

**Er ein vegleiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum bindandi?**

Vegleiðingar frá Arbeiðs-og brunaeftirlitinum eru ikki beinleiðis bindandi fyri virki, aðrir myndugleikar, trygdarskipanir e.o., men vegleiðingarnar tulka reglur (lógum og kunngerðum), sum eru bindandi.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið setir ikki onnur krøv, um t.d. eitt virki hevur gjørt sum tilskilað í eini vegleiðing.

Virkini kunnu loysa uppgávurnar á annan hátt, men Arbeiðs- og brunaeftirlitið metir tá, um hesin háttur er líka so tryggur og í samsvari við reglurnar.

**Meira kunning**

Meira kunning og vegleiðing er at finna á heimasíðuni hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum - www.arb.fo

**Arbeiðs- og brunaeftirlitið**
**Eirargarður 2, 2.hædd**
**FO-100 Tórshavn**
**+ 298 66 44 00**
**arb@arb.fo**

**Inngangur**
Olja og oljuevni koma undir vandamikil, eldfim og dálkandi evni.
Logamarkið fyri dieselolju (fýringsolju) er u.l. $300^0$ C. Logamarkið fyri bensin er $500^0$ C. (Tann hitin, sum skal til fyri at evnið brennur)

Tá verulig oljunýtsla tók seg upp seinast í 18-hundraðtalinum, hendi fleiri stórir eldsbrunar og víttfevnandi dálkingar.
Longu tá blivu reglur settar fyri handfaring, nýtslu, flutningi og goymslu av hesum vandamiklu evnunum.

Sum fyrr, er tað enn umráðandi at handfaring, flutningur og goymsla av fýringsolju er undir skipaðum eftirliti og tryggum umstøðum.

Næstan hvørt húsarhald hevur stóra mongd av olju, og stórt tal av virkjum hava enn størri mongd av olju.
Tangar skulu halda í nógv ár og teir skulu tola snuddir, halda móti herverki, teir skulu kunna flytast, kunna nýtast úti sum inni, í húsarhaldi sum í vinnu, uttan at elva til serligan eldvanda.

Umráðandi er, at tangar eru úr so sterkum tilfari, at vit trygt kunnu lata teir standa uttan serligt eftirlit. Tí eru reglur settar í verk, sum seta neyv dygdarkrøv til oljutangar.
Tangi úr stáli er hóskandi tryggur mótvegis eldi, hita, stoytum o.t., og er eisini at roknað sum umhvørvisliga tryggur.

Henda vegleiðing at seta upp oljutangar, er eitt framhald av krøvunum at gera tangar, soleiðis, at teir eisini eftir uppseting og framhaldandi nýtslu eru tryggir í eitt langt áramál.

Áðrenn farið verður í gongd skal hugsast um, at ein oljutangi skal liggja ella standa á høgligum stað, eisini fyri oljuáfyllingina
Umráðandi er, at áfyllingartúturin ikki er ov langt frá, har tangabilurin kann standa. Somuleiðis er umráðandi, at útluftingarrørið, ið sigur frá tá tangin verður fullur, ikki er ov langt frá áfyllingini.

Merking av oljutangum er av stórum týdningi. Tangin skal alla sína livitíð hava merkingar, spjaldur o.t., soleiðis at síggjast kann um hann er góðkendur, hvør framleiðarin er, hvussu gamal hann er og støddina á tanganum.

**Sniðgóðkenning**
Sambært kunngerð nr. 94 frá 15. juni 1994 um eldfiman løg og Serfyriskipan fyri eldfiman løg, hevur Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur góðkent føroyskar framleiðarar, at framleiða sniðgóðkendar oljutangar. Hesir síggjast á løggildingaryvirlitinum á heimasíðuni hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum (www.arb.fo).
Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur harumframt tikið avgerð um, at sniðgóðkendir tangar, ið eru góðkendir til ætlaða endamálið í øðrum norðanlondum, verða mettir sum sniðgóðkendir til nýtslu í Føroyum.

**1. Uppseting av uttandura tangum yvir jørð**

Ein uttandura oljutangi er úr stáli, uppsettur úti, í einum skúri, ella líknandi. Oljutangin skal merkjast og uppsetast sambært vegleiðing frá framleiðaranum, galdandi kunngerðum og myndugleikareglugerðum, herundir vegleiðingum frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum.




**Krøv og tilmæli:**

1. Uttandura oljutangar skulu vera sniðgóðkendir til uttandura brúk.
2. Tangin skal setast á slætt og fast undirlag sambært vegleiðing fra framleiðaranum. Undirlagið kann vera 10 cm samantrýstur skervur, ið er bundin saman við betongi ella betongflisar ið eru lagdir á 5 cm samantrýstan skerv.
3. Møguligt skal vera at kanna tangan á øllum síðum. Í minsta lagi 5 cm frástøða skal vera millum tanga og annan húsalut, vegg, garð e.t.
4. Áfyllingarrørið skal hava tætt skrúvulok, við merki ella spjaldri, sum vísir m.a. framleiðsluár, tangastødd og slag av olju. Áfyllingarrør, sum ikki ganga beint upp ella, sum verða longd, skulu gerast úr 2" galvaniseraðum stálrøri við halla móti tanganum.
5. Endatútur til útlufting skal hava "hettu" til verju móti vætu, ruski o.t. Útluftingarrør, sum ikki ganga beint upp ella verða longd, skulu gerast ur 1½" galvaniseraðum stálrøri við halli móti tanganum. Tangin skal hava ávaringarskipan móti at verða yvirfyltur. Útluftingarrørið skal vera sjónligt, og ikki longur enn 10 m. frá áfyllingarstaðnum.
6. Allir tútar sum ikki eru í brúk, skulu tættast - blendast.
7. Á oljurørið frá tanganum, skal setast krani.
8. Tangin skal vera útgjørdur so, at til ber at máta/síggja oljunøgdina í tanganum.

**Frástøða til uttandura tangar**

Allir tangar uttandura, skulu vera minst 2,5 m fra marki.

**2. Uppseting av innandura tangum**

Ein innandura oljutangi er úr stáli og til í mesta lagi 1650 litrar, og er uppsettur í t.d. fýrrúmi. Oljutangin skal merkjast og uppsetast sambært vegleiðing frá framleiðaranum, galdandi kunngerðum og øðrum myndugleikareglugerðum, herundir vegleiðingum frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum.

***Innandura tangi við beinum***




**Krøv og tilmæli:**

1. Tangi sum er sniðgóðkendur til innandura nýtslu, má bara uppsetast inni.

2. Tangin skal setast á slætt og fast undirlag sambært vegleiðing frá framleiðaranum.

3. Møguligt skal vera at kanna tangan á øllum síðum. Í minsta lagi 5 cm frástøða skal vera millum tanga og annan húsalut.

4. Áfyllingarrørið skal vera úr 2" galvaniseraðum stálrøri við halli móti tanganum, og hava tætt skrúvulok við merki ella spjaldri, sum vísir m.a. framleiðsluár, tangastødd og slag av olju. Áfyllingartúturin skal vera uttandura.

5. Rør til útlufting skal vera úr 1½" galvaniseraðum stálrøri við halli móti tanganum. Útluftingin skal vera úti. Rørið skal vera í minsta lagi 50 cm yvir jørð og hava "hettu" til verju móti vætu, ruski o.t. Tangin skal hava ávaringarskipan móti at verða yvirfyltur. Útluftingarrørið skal vera sjónligt, og ikki longur enn 10 m. frá áfyllingarstaðnum.

6. Allir tútar sum ikki eru í brúk, skulu blendast.

7. Á oljurørið frá tanganum, skal setast krani.

8. Tangin skal vera útgjørdur, so til ber at máta/síggja oljunøgdina í tanganum.

9. Frástøðan millum tanga og heitar lutir, tól, oljufýr, skorstein, roykrør o.t. skal vera í minsta lagi 50 cm.

**3. Uttandura tangar at leggja í jørð**

Oljutangi at leggja í jørð er úr stáli og rustvardur uttan við glasfipuri.

Tangin skal merkjast og leggjast sambært vegleiðing frá framleiðaranum, galdandi kunngerðum og øðrum myndugleikareglugerðum, herundir vegleiðingum frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum.




**Krøv og tilmæli:**

1. Jørðtangar skulu vera sniðgóðkendir til at grava niður. Góðkendir tangar lúka serlig krøv um byggihátt, styrki og verju móti tæring o.t.

2. Tangin má ikki leggjast undir ella so nær bygningum, at hann ikki kann takast upp aftur.

3. Tá ið tangin verður grivin niður, skal ansast eftir at hann ikki kemur ov nær nærliggjandi fundamentum.

4. Tangi og rørskipan skulu, tá ið hesi verða grivin niður, vera óskalað, og hvørki hava skaða ella hava verið fyri skaða.

5. Uttan um tangan skal vera í minsta lagi 15 cm av sandi ella tílíkum tilfari. Í sandinum skal ikki vera grót, ísur, kavi, ella lívrunnið tilfar.

6. Í minsta lagi 50 cm av jørð skal vera yvir tanganum, um hann liggur í koyriøki við vanligari ferðslu. Tangar, sum ikki eru heilt niðurgrivnir, skulu tyrvast við minst 15 cm tilfari, so sum sandi og tílíkari fyllu. Tryggjast skal at tilfar oman á tanganum ikki skríðir burtur.

7. Áfyllingarrørið skal vera úr 2" galvaniseraðum stálrøri við halli móti tanganum, og hava

tætt skrúvulok við merki ella spjaldri, sum vísir m.a. framleiðsluár, tangastødd og slag av olju. Áfyllingartúturin skal vera uttandura. Um áfyllingin er undir lendinum, skal vera serlig frárenning ella lendið kring brunnin halla frá áfyllingarstaðnum.

8. Rør til útlufting skal vera við1½" galvaniseraðum stálrøri við halli móti tanganum. Rørið skal verða í minsta lagi 50 cm yvir jørð og hava "hettu" til verju móti vætu, ruski o.t. Tangin skal hava ávaringarskipan móti at verða yvirfyltur. Útluftingarrørið skal vera sjónligt, og ikki longur enn 10 m frá áfyllingarstaðnum.

9. Rør til áfylling og útlufting skulu verjast móti skaða og rusti við t.d. gummilímbandi.

10. Tangin skal vera útgjørdur, so til ber at máta/síggja oljunøgdina í tanganum.




**Rørleiðingar**

Oljurør til oljufýringar undir 120 kW skulu vera úr kopari, klødd við plastikki, bæði í og yvir jørð. Støddin á oljurørum skulu vera eftir vegleiðing frá veitara.

Koparrør skulu vera elektriskt isoleraði frá stáloljutangum og stálrørum.




**Krøv og tilmæli:**

1. Rørleiðing millum tanga og oljufýr skal vera einstreingjað.
2. Rørleiðingar í jørð og rør, sum eru innstoypt, skulu, um tað er gjørligt, gerast uttan skoyti. Fjald skoyti skulu gerast sum loddisamlingar, við silvurtini við minst 45% silvur. Skoytini skulu eisini hava „krympimuffu“ sum dekkar alla loddisamlingina við minst 5 cm umskaran við plastikkverjuna á rørinum.
3. Rørleiðingar yvir jørð, sum ikki eru innstoyptar, skulu festast fullgott við rørberarum. Ventilar, oljuavluftarar, filtur og aðrir lutir skulu vera festir. Rørleiðingar yvir jørð, eisini innandura, skulu verjast móti skaða.
4. Rørleiðingar í jørð skulu vera vardar móti at verða skadd, t.d. skulu tey liggja í minsta lagi í 15 cm av sandi.
5. Gjøgnumføringar gjøgnum útvegg skulu vera vatntættar.
6. Á oljuleiðing frammanfyri oljufýringina skal vera ein trygdarventilur sum bráðnar, um hitin fer upp um 70$^{o}$C.
7. Um oljuyvirflatan í tanganum liggur hægri enn súgvirørið, kann ein vakumventilur setast á súgvileiðingina, at forða fyri at brot á súgvileiðingina hevur við sær ótilætlaðan leka. Ventilurin skal innstillast til hæddarmunin á staðnum.
8. Filtur skal setast upp næst oljufýringini, sum er 50-75 µ ella betri.
9. Um møguleiki/vandi er fyri at undirtrýst kemur í tangan, kann ein oljuavluftari (Flow Control) uppsetast við oljufýringina.
10. Hæddin millum súgvirør í tanganum og oljupumpuna eigur ikki at vera meir enn 3,5 m. Er hæddin meir enn 3,5 m, er vandi fyri, at luft kemur í súgvirørið sum órógvar skipanina. Tá kann umhugsast, at uppseta oljupumpu næst tanganum at lyfta oljuna upp til oljufýringina.
11. Oljuslangur millum rørleiðingina og oljufýrið eiga at vera eftir DS/EN ISO 6806, ella betri. Oljuslangur hava eina avmarkaða livitíð og skulu útskiftast eftir tørvi.

**Umvæling, broytingar og niðurtøka**




**Alment**

Umvælingararbeiði og broytingar á tangaskipanum skulu gerast soleiðis, at umvældir og broyttir lutir í skipanini verða fingin í samsvar við galdandi kunngerðir um oljutangar til m.a. sethúsanýtslu.

Tá ið verandi oljutangar verða útskiftir, skal rørskipanin fáast í samsvar við galdandi kunngerðir um tílíkar tangar.

Umvælingar av skoytum ella pørtum av rørskipanum, hava ikki av sær sjálvum við sær, at tangin skal fáast í samsvar við galdandi kunngerð um tangar.

**Umvæling av rørskipanum**

Umvælingar av koparrørsamlingum í jørð og fjaldum skoytum skulu gerast við harðlodding, min 45% silvur. Tær skulu eisini hava vatntætta krympumuffu við minst 5 cm umskaran við plastikkverjuna á rørinum.
Sjónlig skoyti kunnu eisini gerast sum kragasamlingar ella skoyti við klemmiringum og hava vatntætta muffu við minst 5 cm umskaran við plastikkverjuna á rørinum.

**Livitíð fyri tangar**

Um sniðgóðkenningin hjá tanganum ásetur eina livitíð fyri tangan, ella framleiðarin hevur ásett eina livutíð fyri tangan, so er henfan galdandi.

Kunngerð nr. 124 frá 11. september 2018 um at fyribyrgja dálking frá oljutangum ásetur tó fylgjandi um livitíðina:

"**§ 11.** Tangar, sum standa yvir jørð, skulu takast úr nýtslu innan hesar freistir:

1. Góðkendir tangar, við tæringarverju innan, skulu takast úr nýtslu í seinasta lagi 40 ár eftir framleiðsluárið.
2. Aðrir stáltangar skulu takast úr nýtslu í seinasta lagi 30 ár eftir framleiðsluárið.
3. Tangar úr plasti ella øðrum tilfari enn stáli, skulu takast úr nýtslu í seinasta lagi 25 ár eftir framleiðsluárið, sbr. tó nr. 4.
4. Sniðgóðkendir tvíveggjaðir tangar úr plasti ella plasti, har uttari veggurin er úr stáli, skulu takast úr nýtslu í seinasta lagi 40 ár eftir framleiðsluárið.

*Stk. 2.* Aðrir góðkendir tangar, sum standa yvir jørð, skulu takast úr nýtslu í seinasta lagi 20 ár eftir framleiðsluárið.

**§ 12.** Niðurgrivnir tangar skulu takast úr nýtslu innan hesar freistir:

1. Góðkendir stáltangar, sum eru tæringarvardir innan og vardir við glasfipurstyrktum polyester ella aðrari góðkendari verju uttan, skulu takast úr nýtslu í seinasta lagi 50 ár eftir framleiðsluárið.
2. Góðkendir stáltangar, sum ikki eru tæringarvardir innan, men vardir við glasfipurstyrktum polyester ella aðrari góðkendari verju uttan, skulu takast úr nýtslu í seinasta lagi 40 ár eftir framleiðsluárið.
3. Plasttangar skulu takast úr nýtslu í seinasta lagi 45 ár eftir framleiðsluárið.

**§ 13.** Tangar við ókendum framleiðsluári ella tangar, sum ikki eru góðkendir ella hava ókenda konstruktión ella ókent tilfar, skulu takast úr nýtslu soleiðis:
1. Innan 1. januar 2024, um húsini eru bygd fram til og við 1960.
2. Innan 1. januar 2025, um húsini eru bygd í tíðarskeiðinum 1961-1980.
3. Innan 1. januar 2026, um húsini eru bygd í tíðarskeiðinum 1981-2000.
4. Innan 1. januar 2028, um húsini eru bygd eftir ár 2000.

**§ 14.** Í serligum føri kann kommuna leingja freistina fyri útskifting, eitt nú í økjum, har ætlan er um at hava felags hitaveiting.
*Stk. 2.* Freistin kann eisini leingjast við tíðarskeiði, sum svarar til tíðina, tað tekur at brenna tangan tóman."

Um broytingar verða gjørdar viðv. áfylliggini, tangin er fluttur ella avriggaður skal oljuveitari hava boð.
Tá tangar í jørð verða tiknir úr brúki, kann kommunali eftirlitsmyndugleikin krevja skjalprógv fyri at tangin ikki elvir til dálking.

*Seinast dagførd 14. september 2018*